Beinta Løve Jacobsen og aðrir Talibanar

EGIN MARKNÁ

Tit, ið skíra onnur at vera talibanar og fundamentalistar eru tað sjálvi í tykkara fremjan av egnum áhugamálum. »Tað man kallar onnur, er man sum oftast sjálvur«. Tá tú peikar eftir øðrum, peika minst tríggir fingrar eftir tær sjálvari.

Føroyska málið hevur í øldir havt trý kyn: kallkyn, kvennkyn og hvørkikyn, men síðstu árini hevur eitt miðvíst arbeiði verið gjørt, fyri at trýsta eitt kyn afturat - samkyn ella samkynd - inn í føroyska málið. Jú sanniliga, tíðirnar skifta. Tað, sum okkara háttvirda orðabók „Føroysk – Donsk", kallar hetta, er nú vorðið niðrandi tala – hvør er myndugleikin?

Hví kunnu tit ikki, sum fólk flest, hava tykkara sexualitet/kynslív innanveggja, heldur enn altíð at blanda samfelagið uppí.

Góða Beinta, hóast eg ikki kenni teg, so ynski eg tær bara alt tað besta og blíðan byr á lívsleiðini – hóast hetta.

Generelt um Talibanar

Vit standa í einum mentunarbardaga, har sterkar kreftir royna at skeikla okkara lógarverk og samfelagsbygnað. Tað er so skjótt hjá einum samfelag at reka av kós. Feskasta dømið um hetta er Noreg og tað syndarliga svansið, ið gongur fyri seg á etiska økinum har.

Tað eigur at geva okkum føroyingum nakað at hugsa um og at verða á varðhaldi.

Við málinum um 266b í bakspeglinum, vita vit, hvussu Talibanar arbeiða. Meira enn eitt ár áðrenn málið varð endaliga reist í løgtinginum, byrjaði propagandaðin. Gerandisdagurin varð merktur av dagligari og kritikleysari atgongd í fjølmiðlunum – hetta, serliga í útvarpinum, har undangongufólkini týðuliga hava kontaktir á røttum stað. Alt bleiv gjørt fyri at ávirka fólkameiningina.

Síðani fingu teir løgreglna at sláa eitt slag fyri sakini, og sum rosinan í pylsuendanum, vórðu føroyingar hóttir við at »Landsforeningen for Bøsser og Lesbiske« fóru undir boykott-kampagnu móti Føroyum; og so bar til. Veikir politikarir hoyknaðu, og talibanarnir vunnu fyrstu stigini. Men tit sum halda, at nú valdar friður, mugu trúgva umaftur.

Minnist til, næstu ferð hóttanirnar koma, at tað er ikki so langtsíðani at felagsskapurin at: »Landsforeningen for Bøsser, Lesbiske og pædofile«, so tað sigur alt um, hvørja virðing hesi feløg hava uppiborið.

Teir politikarar, sum dagliga rópa upp ímóti danskari uppíblandan í føroysk viðurskifti, eru merkiliga kúrrir, tá tað koma slíkar hóttanir úr Danmark – hví? – man tað passa inn í teirra kram?

Politikkur er vald. Talibanarnir vilja fegnir taka valdið – skulu vit bara hyggja at?

Skattalætti nei takk

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin

Tað er ein stórsigur fyri partarnar á arbeismarknaðinum, at løgtingið samtykti broytingarnar í ALS skipanini, sum stýrið mælti til. Hesar broytingar hava við sær, at útgjaldið hækkar upp í 20.000 kr, at sjómenn verða ein partur av skipanini og ikki minst, at fiskavirkisskipanin verður munandi broytt til tað betra. Hetta eru stórir batar, ið øll eiga at fegnast um.

Ein onnur broyting er, at hámark er sett fyri, hvussu nógv ein skal gjalda inn í skipanina. Hetta merkir, at ein ikki skal gjalda av tí partinum av inntøkuni, ið er oman fyri 650.000 kr. Sambært toll og skatt eru tað áleið 762 fólk, ið hava eina inntøku oman fyri 650.000 kr. Andstøðan fokuseraði mestsum bara upp á hesa broytingina, og vildu hava løgtingið at samtykkja, at onki hámark skuldi verða fyri inngjaldið. Hetta tóku vit ikki undir við. Orsøkin er tann einfalda, at ALS er ein tryggingarskipan, og tí má tað vera eitt lutfall ímillum, hvussu nógv ein skal gjalda inn í skipanina og hvussu nógv ein fær útaftur. Hartil kemur, at vit halda tað vera burturvið, um løgtingið ikki virðir semjurnar sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera.

Ongan skattalætta

Tað kann ljóða løgi, at teir breiðastu herðarnir á henda hátt í veruleikanum fáa ein skattalætta. At geva skattalætta til tær hægstu inntøkurnar í hesum tíðum, heldur Javnaðarflokkurin ikki vera rætt. Samgonguskjalið hevur ongar ásetingar um at gevast skulu skattalættar.

Men skattapolitikkur skal ikki førast gjøgnum ALS skipanina, tað ger man við at broyta skattalógina. Tað gagnar ikki vanliga løntakaranum, at ALS uppsamlar meira pening í hesum tíðum. Skipanin hevur eina eginogn á 700 mió, og tí er skipanin fíggjarliga sterk. Tað rætta er tí at tillaga skattaskipanina so at peningurin kemur í landskassan og hann tann vegin kann verða við til at fíggja okkara vælferðarskipannir.

Samgongan arbeiðir við einum fíggjarpakka, og tað er ein sjálvfylgja fyri Javnaðarflokkin, at tillagingar verða gjørdar í skattastiganum, so teir breiðastu herðarnir framvegis bera sama part sum innan broytingina í ALS skipanini.

Men sig hvat ger tingið...

HØGNI HOYDAL

Vit hava ikki ráð til tað ábyrgdarloysið og ta undirgraving av fólkaræði, ið sitandi landsstýrissamgonga stendur fyri. Rokningin og upptakið verða øgilig – og komandi ættarlið skulu svíða fyri fáfongdina og sjálvsøknið hjá einstøku flokkunum og politikarunum

Tað er ilt at finna orð fyri tí, ið hevur gingið fyri seg á tingi seinastu vikurnar, áðrenn tingið fór til hús. Hugsi neyvan, at nakar er greiður um tað. Tí í bløðum og fjølmiðlum sæst onki um, hvat gongur fyri seg, hóast Útvarpið hevur roynt at lýst summi mál. Ístaðin hoyra vit Edmund Joensen, sum í seinastu viku saman við samgonguni atkvøddi fyri at víkja frá øllum tíðarfreistum, so at tingið skuldi skrumbla alt ígjøgnum og fara til hús, biðja tingið koma saman aftur (!). Soleiðis endurtaka samgongufólk støðugt andstøðunnar mótmæli, men standa ikki við tey, tá atkvøðast skal.

Støðan í føroyskum stjórnmálum kann lýsast soleiðis:

Onki átak frá landsstýrinum

Ein landsstýrissamgonga, sum undanfarnu 4 árini slepti allari búskaparligari stýring og politiskari kós, hevur nú í 9 mánaðir ikki tikið eitt einasta stig til tess at ásanna sína ábyrgd og at leggja á annan bógv.

Fíggjarlógarhallið verður nú mett til 720 milliónir krónur. Fyrsta mánaðin CHE-samgongan sat, framdi hon eina rød av broytingum soleiðis, at partar av skattalættunum vórðu tiknir burtur aftur og avgjøld vórðu hækkað, sum minkaðu hallið hjá landskassanum 100 milliónir. Fíggjarnevndin og Løgtingið minkaðu aðrar 100 milliónir av hallinum í desember í fjør. Vórðu hesi átøk ikki gjørd, var hallið komið upp á knappa milliard – og landsstýrið hevur enn ikki gjørt eitt einasta uppskot ella tikið nakað stig búskaparliga og fíggjarliga.

Kortini hevur landsstýrið lagt stóran dent á, at øll uppskot frá andstøðuflokkunum um fíggjarlig og búskaparlig átøk skulu fellast – og tey hava ikki skortað. Seinasta dagin varð enntá uppskotið hjá andstøðuni um at gera eina 10-ára íløguætlan, felt.

Kaj Leo Johannesen, kravdi í desember 2007, at val varð útskrivað, tí Sambandsflokkurin kundi ikki liva við teimum risaíløgum, sum spolaðu upp í einum valrúsi. Hetta var áðrenn altjóða fíggjar- og búskaparkreppan yvirhøvur var byrjað. Nú er hann løgmaður í eini samgongu, sum hevur samtykt uppaftur størri íløgur enn tær, sum vóru á borðinum í 2007.

Bert tey veikastu skulu gjalda

Tær einastu fíggjarligu broytingarnar, hetta landsstýrið hevur lagt fram, leggja eftir teimum allarveikastu samfelagsbólkunum við smáum upphæddum, ið onki muna á landskassaroknskapinum, men raka samfelagsbólkarnar meint:

· Pensjónistar ið bert hava fólkapensjón.
· Einkjur og einkjubørn.
· Familjur hjá børnum, ið bera brek.
· Lesandi.
· Tímalønt

Teir samfelagsbólkar, ið sjálvandi mugu bera eina størri byrðu nú og sum fingu mestu skattalættarnar, hava higartil onki goldið – og ríkasti bólkur hevur enntá fingið ein eyka skattalætta gjøgnum ALS-gjaldið.

Brot á allar mannagongdir

Men hvat hevur so tingið havt á borðinum hesar vikur, har alt skuldi skundast ígjøgnum uttanfyri allar tíðarfreistir?

Ja, millum annað eru 23 uppskot løgd fram frá landsstýrinum, 6 vikur aftaná seinastu tíðarfreist. Tað er ongantíð hent áður í føroyskari tingsøgu. Harímillum eru stórar og avgerandi broytingar gjørdar í lógini um vinnuligan fiskiskap, í alilógini og í matrikullógini, sum eftir mínum tykki fara at flyta stóra virðir frá felags ogn til einstakar bólkar – og uppskotini hava onga líkinda viðgerð fingið.

Í onkrum av hesum málum, vórðu avgerandi broytingar gjørdar í uppskotunum náttina fyri, at tey skuldu samtykkjast við 3. viðgerð. Og í einum máli, mælti tann myndugleikin, sum skal umsita lógina og hevur allan serkunnleikan, staðiliga frá at samtykkja lógina.

Danska revsilógin varð sett í gildi fyri Føroyar við øllum teimum høgravendu og populistisku broytingunum, sum Dansk Folkeparti hevur kravt í Danmark, men sum tey flestu eru samd um, hava verið til ógagns fyri rættartrygdina og fyri at fyribyrgja brotsverk og harðskap. Einasta, sum samgongan samdist um at taka burtur, vóru mannarættindaverjur fyri fólk við ymsum kynsligum tilhalli. Ikki bert viðvíkjandi happing, háðan og spotti, sum 266b ásetur. Samgongan tók eisini burturúr revsilógini fleiri aðrar greinar ið áseta, at um harðskapur verður framdur orsakað av kynsligum tilhalli, so skal tað revsast hart. Ófatiligt, at Javnaðarflokkurin kann liva við tí.

Harafturat kom fram seinastu dagarnar í tinginum, at landsstýrið hevur borið 52 mál í tingið, sum ikki eru løgfrøðisliga eftirkannað. Hetta er ongantíð komið fyri áður, hóast okkurt landsstýrisfólk hevur sagt tað í fjølmiðlunum. Áður hevur tað verið so, at eitt mál sleppur als ikki í tingið uttan at tað er løgfrøðisliga eftirkannað á lógardeildini í Tinganesi.

Og í øllum hesum ruðulleika og ábyrgdarloysi, varð seinasta dagin í tinginum enn einaferð uppskot felt frá andstøðuni um at játta eina millión afturat til Fróðskaparsetrið, so næmingar kunnu takast inn á søgu- og samfelagsdeildina.

Skapa tað mistreystið, ið teir skulu liva av

Alt er bert eitt tilvildarligt valdsspæl millum flokkar og einstakar politikarar, har tann sterkasti og tann frekasti vinnur. Og tingið kundi fyri tað, als ikki verið til.

Enn sum áður, er úrslitið av hesum ábyrgdarloysi, at rokningin og upptakið verða send til onnur og til komandi ættarlið – og at álitið á okkum sjálvi sum fólk og á fólkaræðið verður miðvíst máað burtur.

Tíverri tykist tað, sum teir flokkar, ið standa fyri hesum, rokna við at fáa gagn burturúr tí mistreysti, teir sjálvir skapa. Tí, um vit ikki hava álit á okkum sjálvum og ikki megna at stýra okkara búskapi og gera tryggar sosialar skipanir, so hava sambandsflokkarnir prógvað sín boðskap. Og tað er fyri mær ongin ivi um, at ongin kann virka so ábyrgdarleyst, sum sitandi samgonguflokkar gera, uttan so at teir eru vísir í, at Danmark nokk skal bjarga teimum burturúr sínum egnu gerðum, tá teir aftur hava blakað alt fyri borð.

Ímeðan fara vit nú inn í eitt summar, har tað ikki fer at skorta við tíðindaskrivum frá landsstýrisfólkum, har tey fara at royna at profilera seg á ymsan hátt við leysum ætlanum, og sum tey rokna við fara at verða lisin ókritiskt upp í fjølmiðlunum